UTTAN ÚR HEIMI

## Ov lítið til vælferðina

Verða tær donsku vælferðarveitingarnar verandi á sama støði sum nú, fara 60 milliardir krónur at resta í árliga um nøkur fá ár.

Seinastu mánaðarnar hevur ein serlig nevnd hjá stjórnini kanna verandi vælferðarskipan, og um møguligar broytingar skulu gerast í skipanini. Frágreiðingin hjá nevndini verður ikki løgd fram fyrr enn í næstu viku, men blaðið Børsen hevur fingið fatur á einum parti av niðurstøðuni. Har kemur millum annað fram, at verða verandi vælferðarveitingar ikki broyttar, fara 60 milliardir krónur at resta í á hvørjum ári um nøkur fá ár. Nevndin sigur tí, at annaðhvørt má skipanin broytast, ella má skattaprosentið hækka átta prosent, og tað hevði oyðilagt danska búskapin.

Thor Pedersen, fíggjarmálaráðharri, er ikki samdur við vælferðarnevndini. Hann segði við danska útvarpið í gjár, at eydnast tað at fáa tær nógvu innflytararnar út á arbeiðsmarknaðin, ber til at sleppa undan trupulleikunum. Thor Pedersen segði, at við skynsemi kann Danmark varðveita verandi vælferðarskipan.

## Fáa ov lítla avbjóðing

Evropeiski samstarvs- og menningarfelagsskapurin, OECD, heldur ikki nógv av danska fólkaskúlanum.

Í einari frágreiðing, sum varð almannakunngjørd í gjár, sigur OECS, at teir donsku skúlanæmingarnir fáa alt ov fáar avbjóðingar innan skúlagátt. Sagt verður, at lærararnir hava tørv á betri leiðarum, sum kunnu leggja størri dent á frálæru heldur enn umsiting. Sambært bretska professaranum Peter Mortimer hava hvørki lærararnir ella skúlastjórarnir gjørt sær greitt, hvat málið við frálæruni í skúlanum er.

Frágreiðingin hjá OECD er framhald av einari frágreiðing, sum kom fyri trimum árum síðani, og sum millum annað kom til ta niðurstøðu, at donsk skúlabørn eru verri fyri enn børnini í nógvum øðrum londum. Eitt nú vísti frágreiðingin á, at nógv donsk skúlabørn hava ilt við at lesa danskt.

## Ein stór hóttan

Hernaðarstýrið í asiatiska landinum Myanmar, sum er fyrrverandi Burma, er ein álvarssom hóttan.

Tað heldur amerikanski forsetin, George W. Bush, og mánadagin samtykti Kongressin í Washington at leingja amerikonsku tiltøkini ímóti hernaðarstýrinum. Tað ber millum annað í sær, at amerikanskir íleggjarar sleppa ikki at gera íløgur í Myanmar, og tiltøkini ávirka eisini samhandilin ímillum londini. .

Í einari røðu fyri Kongressini segði Bush, at politikkurin hjá hernaðarstýrinum í Myanmar er fíggindaliga sinnaður mótvegis USA, og at hann hóttir amerikanskan trygdar- og uttanríkispolitikk. Forsetin legði eisini hernaðarstýrið undir at kúga ta demokratisku andstøðuna. Í hesum sambandi nevndi hann andstøðuleiðaran Aung San Suu Ky. Hon sat í fongsli fýra mánaðir í fjør, og seinastu átta mánaðarnar hevur hon sitið í húsavarðhaldi eftir boðum frá hernaðarstýrinum.

## Taravinna í Grønlandi

Í løtuni verður kannað, um grundarlag er fyri at fara undir at gagnnýta tann nógva taran, sum er allastaðni fram við grønlendsku strondini.

Ole Hertz, sum stendur fyri kanningini, sigur við grønlendska útvarpið, at í fyrsta umfari verður kannað, um taravinna kann gerast eitt ískoyti hjá á bygd. Eitt nú hevur verið umhugsað at nýta taran sum kraftfóður hjá seyði í Suðurgrønlandi, men útflutningsmøguleikarnir skulu eisini kannast. Ole Hertz sigur, at møguleikarnir at selja tara av landinum eru góðir. Hann vísir á, at bæði íslendingar, norðmenn og kanadiumenn gagnnýta nógvan tara.

Kanningarnar í Grønlandi umfata tvey tarasløg. Ole Hertz sigur, at teir hava valt at kanna júst hesi bæði sløgini, tí tey eru løtt at fáa hendur á.

# Danmark hevur svikið Geneve-sáttmálarnar

**Reyði Krossur leggur donsku stjórnina og Fólkatingið undir at hava svikið tær týdningarmestu ásetingarnar í Geneve-sáttmálunum**

FANGAVIÐFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Danmark hevur staðfest Geneve-sáttmálarnar og hevur tí skyldu at gera sítt til, at hini londini, ið hava staðfest sáttmálarnar, halda teir, men skiftandi danskar stjórnir hava ikkið tikið hesa skylkduna í álvara.

Tað skrivaði aðalskrivarin í Reyða Krossi í Danmark, Jørgen Poulsen, í einari grein í blaðnum Information í gjár.

Hann Jørgen Poulsen heldur, at síðani tann 11. september í 2001 hava tey mentaðu og demokratisku londini ikki verið so íðin eftir at halda tær mest grundleggjandi reglurnar um mannavirði og mannarættindi. Úrslitið er, at nú er tað rætturin hjá tí sterka, sum ræður.

Tað er ikki ofta, at Reyði Krossur í Danmark finst at donsku stjórnini, men Jørgen Poulsen skrivar, at hann kann ikki tiga longur.

– Tøgn er ikki eitt eyðkenni hjá Reyða Krossi. Vit tiga, um tað tænir ofrunum best, men vit tosa, um tað er betur. Vantandi virðingin fyri hesum lógunum er vorðin slík, at eg fái í hvussu er ikki tagt longur, skrivar aðalskrivarin í danska Reyða Krossi í greinini.

# Sluppu at giftast



*Tær báðar Julia og Hillary Goodridge eru vorðnar giftar, eftir at hægstirættur í amerikanska statinum Massachusetts hevur gjørt av, at samkynd hava loyvi at gifta seg. Bush, forseti, hevur sagt, at hann fer at royna at broyta grundlógina, so hjúnarlag ímillum samkynd verður bannað*

*Mynd: Reuters*

# Nú siga flestu norðmenn ja til ES

**Undirtøkan fyri norskum limaskapi í ES veksur støðugt, og nú er meiri enn helmingurin av fólkinum fyri limaskapi**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Var fólkaatkvøða í dag um norskan limaskap í Evropasamveldinum, hevði Noreg farið uppí.

Ein meiningakanning, sum stovnurin Opinion hevur gjørt, vísir, at 51 prosent høvdu atkvøtt fyri limaskapi, meðan bara 36 prosent høvdu atkvøtt ímóti. Tey seinastu 13 prosentini vita ikki, hvar tey høvdu sett krossin.

Samanborið við eina tilsvarandi kanning fyri einum mánað síðani er undirtøkan fyri ES-limaskapi vaksin fýra prosentstig, meðan mótstøðan er óbroytt. Eisini vísir kanningin, at 20 prosent av teimum, sum atkvøddu ímóti ES-limaskapi á fólkaatkvøðuni í 1994, høvdu atkvøtt fyri nú.

Verður hugt at undirtøkuni ímillum veljararnar hjá teimum einstøku flokkunum, er næstan allir flokkarnir fyri limaskapi. Í tí størsta flokkinum, Arbeiðaraflokkinum, eru 62 prosent av veljarunum fyri ES-limaskapi, í Høgra eru heili 88 prosent fyri, og í Framburðsflokkinum taka 58 prosent undir við limaskapi í ES. Sosialistiski Vinstriflokkurin hevur verið tann harðasti mótstøðuflokkurin, men eisini har veksur undirtøkan fyri limaskapinum.



*Flestu veljararnir hjá Arbeiðaraflokkinum eru fyri limaskapi í ES, men floksformaðurin, Jens Stoltenberg, heldur, at norðmenn eiga at hugsa seg væl um*

ítróttur

Nr. 94 • mikudagur • 19. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# MB svarar aftur

**Miðvágs Bóltfelag sendi í mánadagin út tíðindaskriv, har viðmerkingar verða gjørdar um slitið við SÍF**

FS-VÁGAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*So hevur nevndin í MB gjørt av at svara atfinningunum móti avgerðini um at síta FSV-samstarvið. Men framvegis tykist tað, sum er seinasta orðið ikki sagt í málinum*

Tað er nú góð vika síðani, at MB í tíðindaskrivi boðaði frá, at samstarvið kring FS-Vágar verður sagt upp, tá hetta kappingarárið endar.

Sum vit áður hava nevnt her í blaðnum, so bar tá ikki til at fáa viðmerkingar um málið frá nevndini í MB, men seinnapartin mánadagin kom so eitt tíðindaskriv frá felagnum.

Fyrst og fremst sigur nevndin, at tey við skrivinum vilja vísa aftur, at nakað óregluligt er farið fram í samband við slitið. Eykaaðalfundur skal haldast í heyst, har limirnir skulu gera av, hvørt samstarvið skal endaliga slítast, og so skuldu viðtøkurnar verið hildnar hesum viðvíkjandi.

Í aðrar mátar tykist tað, sum er rúkandi ósemja millum MB, FS Vágar og SÍF um fíggjarligu viðurskiftini. MB sigur seg í øllum førum einki hava sæð til UEFA-pengarnar, sum FSF letur feløgum til ungdómsarbeiðið. Hetta eru pengar, sum sambært FS Vágum eru nýttir í ungdómsarbeiðinum, og siga tey seg eisini kunna vátta hesum, men í tíðindaskrivinum sigur MB, at tey so ongantíð hava fingið møguleika at síggja hetta skjalprógv.

Tíðindaskrivið prentað vit niðanfyri í heilum líki, men eftir tí, sum er at hoyra úr ymsu legunum, so merkir hetta helst ikki, at seinasta orðið í málinum er sagt enn.

Tíðindaskrivið er soljóðandi:

»Samstarvið millum Miðvágs Bóltfelag og Sandavágs Ítróttarfelag um FS-Vágar hevur ikki virkað eftir ætlan, og tí hevur nevndin í MB sagt samstarvið upp. Nevndin vísir hervið aftur øllum tosi um, at nakað óregluligt er farið fram í hesum sambandi. Á skrivstovuni hjá MB eru øll skjøl til taks, sum prógva hesum.

### MB í søguna?

Samstarvið millum liðini í Vágum fevnir um vaksnamannadeildir og unglingadeild. Gomlu bygdarfeløgini hava framvegis ábyrgdina av yngru deildunum annars og ungdómsarbeiðinum.

MB eigur tveir limir í nevndini fyri FS-Vágar. Hesir umboðsmenn okkara hava sýtt fyri at geva nevndini í MB innlit í roknskapar- og fundarfrágreiðingar.

MB hevur lagt stóra orku í ungdómsarbeiðið, og tað hevur eisini givið góð úrslit. Men MB hevur ongantíð fingiði eina krónu av UEFA-pengunum, sum eru ætlaðir til ungdómsarbeiðið - og einki annað!

Eftir fleiri fundir, har roynt hevur verið at fáa hesi og onnur viðurskifti í rættlag, gjørdist nevndini í MB greitt, at nevndin í FS-Vágum of formaðurin í fótbóltsnevndini hjá SÍF arbeiða fyri at avtaka MB og SÍF sum fótbóltsfeløg til frama fyri FS-Vágar. Einasta ítróttargrein, sum MB tekur lut í, er fótbóltur, og tískil er hetta tað sama sum at avtaka MB.

Á eykaaðalfundinum hjá MB í desember 2003 varð samtykt, at MB skal ikki geva frá sær yngru deildirnar.

Á fundi um málið boðaðu nevndin í FS-Vágum og formaðurin í fótbóltsnevndini hjá SÍF MB frá, at fáa teir ikki børnini niður í 8-10 ár, so er einki at samstarva um.

Nevndin í MB tók hetta til eftirtektar, boðaði SÍF frá avgerðini í innskrivaðum brævi, kunnaði FSF og sendi fjølmiðlunum tíðindaskriv.

### Ítróttini at frama

Nevndin í MB arbeiðir á tí grundarlag, sum lagt varð á seinasta eykaaðalfundi, og fyrireikar seg nú til komandi eykaaðalfund, sum verður hildin, eftir at setinasta bríkslið í kappingarárinum hevur ljóðað.

Verður avgerðin um at siga upp samstarvið við SÍF staðfest á eykaaðalfundi, fer nevndin at leggja fram greiðar mannagongdir fyri, hvussu samstarvið skal gerast upp á skilabesta hátt.

Eisini fer nevndin at leggja fram menningarætlan fyri MB, sum byggir á ta siðvenju, ið felag okkara hevur.

Høvuðsendamálið er, at bygdarfólkið kann gleðast um ítróttina, vera virkið á vølli og taka lut í felagsarbeiðinum.

Nevndin metir ikki, at tað er ein fyritreyt fyri at sigra, at mannamunur verður gjørdur á børnum og unglingum – heldur tvørturímóti.

Menningarætlanin fer vónandi at tryggja breiða luttøku í felagnum á øllum stigum.

### MB 100 ár

21. janaur 2005 eru 100 ár liðin, síðani MB varð sett á stovn.

Á eykaaðalfundinum fer nevndin at leggja fram uppskot um, hvussu tey 100 árini skulu hátíðarhaldast, og nevndin tekur gleðiliga ímóti hugskotum í hesum sambandi.

Nevndin í MB vónar, at FS-Vágar fer at standa seg væl í kappingini, tað sum eftir er, so at vágamenn fáa eitt 1. deildarlið komandi kappingarár.«

Brævið er við ítróttarkvøðu undirskrivað av formanninum í Miðvágs Bóltfelag.

# Rennikapping á Skála

**Á bygdastevnuni á Skála komandi vikuskifti, verður rennikapping partur av skránni**

Fríggjadagin 21. mai skipa Skála Ítróttafelag og Roysnið fyri rennikapping á Skála. Startur og mál eru við Sparikassan. Kappast verður í ymsum bólkum hjá børnum og vaksnum. Trý tey fyrstu á mál í øllum bólkum fáa heiðursmerki. Kappast verður í hesum bólkum:

Gentur/Dreingir -7 (f. 1997-)
Gentur/Dreingir -10 (f. 1994-96)
Gentur/Dreingir -13 (f. 1991-93)
Gentur/Dreingir -17 (f. 1987-90)
Kvinnur/Menn (f. 1959-86)
Kvinnur/Menn veteranar (f. -1958)
Startur og mál hjá øllum bólkum er við Sparikassan.

### Rutan

Tey vaksnu byrja at renna úteftir við Sparikassan og sneiða beinanvegin niðaneftir. Tá tey hava runnið brekkuna, renna tey inn eftir landsvegnum og sneiða so oman á gamla bygdavegin, og renna út til Sparikassan aftur. Tey vaksnu renna hesa leið tvær ferðir. Tilsamans er teinurin umleið 6,4 kilometrar.

Tey ungu (-13 og -17) renna somu leiðina einaferð. Teinurin hjá teimum er umleið 3,2 kilometrar. Tey byrja saman við teimum vaksnu.

Tveir teir yngstu bólkarnir hjá børnum renna einar 250 metrar inn eftir vegnum við Sparikassan og venda út aftur. Samlaði teinurin hjá teimum er umleið ein hálvan kilometur.

Sagt verður annars frá, at tilmeldingin til kappingina fer fram á heimasíðuni, www.athletics.fo, og at starnumrini skulu avheintast á staðnum kl. 18.15. Sjálv rennikappingin byrjar kl. 18.45.